


# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir málsviðgera til Akstovuna at byrja skjótast til ber. Talan er um parttíðarstarv.

## UPPGÁVAN
Uppgávan fevnir m.a. um:

- Telefonavgreiðslu
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Sýnsumsiting

## FØRLEIKAKRØV
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella samsvarandi lærdómi og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi og tænastuhugaður. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

## SETANARTREYTIR
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

## UMSÓKNIR
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 2. september 2008.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Búgva Apol, deildarleiðara, á telefon 350 400.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið.*

*Á Akstovuni starvast 21 fólk.*

SENDISTOVAN

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo



# DROYMIR TÚ UM AT ARBEIÐA SUM MIÐLAGRAFIKARI?

**Føroyaprent søkir miðlagrafikaralærling**
Droymir tú um at arbeiða innan grafiska økið, er læruplass sum miðlagrafikari nakað fyri teg. Tær dámar at gera eitt arbeiði við stórum neyvleika og høgari góðsku, og tú trívist at arbeiða við tíðarfreistum.

Við eini útbúgving sum miðlagrafikari ført tú førleika, vitan og royndir, sum geva nógvar møguleikar, bæði á arbeiðsmarknaðinum og til víðari útbúgving. Sum miðlagrafikaralærlingur lærir tú at brúka tíni kreativu evni, saman við nógvum tekniskum snildum. Tú arbeiðir bæði við at menna hugskot, sniðgevur hesi, og sendir hesi víðari til aðrar framleiðslur. Men tú lærir eisini nógv um teg sjálvan, og hvussu tú skalt fyrihalda teg til tað fakliga, til arbeiðsplássið og til starvsfelagarnar.

**Útbúgvingin bjóðar annað enn drúgvar bøkur og tímalangar undirvísingardagar**
Sum lærlingur á Føroyaprent sleppur tú beinanvegin at royna teg í einum livandi arbeiðslívi við ábyrgd. Tú ert undir útbúgving, men eisini longu í ferð við at fáa tær arbeiðsroyndir á størstu grafisku fyritøku í landinum.

*Vilt tú vita meira far inn á heimasíðu okkara www.foroyaprent.fo/net*
*Umsókn við CV skal verða okkum í hendi seinast 15. sept. 2008.*

Føroyaprent
Hoyvíksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · info@foroyaprent.fo




# Renault Laguna til sølu

Bilurin er frá desember 1998. Hevur fløguspælara og el-rútar. Bilurin er enskur, men er skrásettur í Føroyum og er góður at koyra.

Verður seldur **SERA BÍLIGA** vegna flyting.

**Áhugaði kunnu ringja á tel. 222081**




**EIÐI2** KONSORTIET

# Hevur tú hug at gera tunnil?

So er møguleikin her, tí vit hava brúk fyri arbeiðsfólki til tunnilsarbeiði í Eysturoynni. Góð løn verður latin, og møguleiki er fyri upplæring. Verkætlanin er partur av **EIÐI2** vatnorkuútbyggingini hjá SEV, og umfatar atkomuveg og uml. 2,6 km av tunnilsgerð.

Hevur tú hug at verða við, so fæst meira at vita við at ringja til Hilbert Elisson á tel. +298 585014, e-mail: hie@mth.dk

**EIÐI2 Konsortiet**
Hoydalsvegur 42
FO-100 Tórshavn

J&K PETERSEN CONTRACTORS

MTHøjgaard